# VEGLEIÐING UM DÁTUVERNDARFÓLK

**Oktober 2020**

**2. útgáva**

Dátueftirlitið

# Innihaldsyvirlit


1. Hvat er eitt dátuverndarfólk? ....3

1.1 Sambandi millum dátuábyrgdaran og dátuverndarfólkið ....3

2. Ábyrgdin hjá almennum myndugleikum at tilnevna eitt dátuverndarfólk ....4

2.1 Nær skal ein almennur myndugleiki tilnevna dátuverndarfólk? ....4

2.2 Nær er man ein almennur myndugleiki? ....4

2.3 Felags dátuverndarfólk fyri almennar myndugleikar ....4

2.3.1 Kommunur ....5

2.3.2 Aðalráð og stovnar undir aðalráðnum ....5

2.4 Samanumtøka ....6

3. Ábyrgdin hjá privatum at tilnevna eitt dátuverndarfólk ....7

3.1 Nær skulu privat tilnevna eitt dátuverndarfólk ....7

3.1.1 Treyt nr. 1: Kjarnuvirksemi ....8

3.1.2 Treyt nr. 2: Umfatandi viðgerð ....9

3.1.3 Treyt nr. 3: "Yvirvøka av skrásettum, sum er reglulig og skipað" *ella* "viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum" .... 10

3.1.4 Allar treytirnar eru loknar .... 11

3.2 Sjálvboðin tilnevning av dátuverndarfólki .... 12

3.3 Felags dátuverndarfólk .... 12

3.4 Samanumtøka .... 13

4. Dátuverndarfólkið .... 14

4.1 Krøv til fakligar førleikar .... 14

4.2 Hvør kann verða dátuverndarfólk .... 14

4.2.1 Innanhýsis starvsfólk .... 15

4.2.2 Uttanhýsis dátuverndarfólk ... 16

4.2.3 Felags dátuverndarfólk ... 16

4.3 Uppgávurnar hjá dátuverndarfólkinum ... 16

4.3.1 Kunna og ráðgeva dátuábyrgdara, dátuviðgera og starvsfólkunum um dátuvernd ... 17

4.3.2 Halda eyga við at dátuverndarlógin og aðrar reglur um dátuvernd verða hildnar 17

4.3.3 Ráðgeva um avleiðingargreiningina um dátuvernd, og halda eyga við, at hon verður gjørd í samsvari við reglurnar ... 18

4.3.4 Samstarva við Dátueftirlitið og virka sum samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum í spurningum um viðgerð av persónupplýsingum ... 18

4.4 Krav um rættstundis og nøktandi hoyring av dátuverndarfólkinum ... 18

4.4.1 Nær skal dátuverndarfólkið takast við uppá ráð? ... 18

4.4.2 Hvussu skal dátuverndarfólkið takast við uppá ráð? ... 19

4.4.3 Nær er dátuverndarfólkið tikið við uppá ráð rættstundis? ... 19

4.4.4 Viðgerðir sum eru farnar í gongd, áðrenn dátuverndarfólkið er tilnevnt ... 20

4.4.5 Nær er hoyringin nøktandi? ... 21

4.4.6 Tíð og orka ... 21

4.4.7 Atgongd ... 22

4.4.8 Óheftni ... 22

4.5 Vernd av dátuverndarfólkinum ... 23

4.6 Samandráttur ... 23

# 1. Hvat er eitt dátuverndarfólk?

**Uppgávan hjá dátuverndarfólkinum er at ráðgeva í spurningum um dátuvernd. Dátuverndarfólkið skal hoyrast í øllum málum, sum eru viðkomandi fyri dátuverndina í felagnum ella stovninum.**

Dátuverndarfólkið skal verða við til at tryggja, at dátuábyrgdarin heldur dátuvernarlógina. Dátuverndarfólkið er tískil ein týdningarmikil partur av bygnaðinum hjá dátuábyrgdaranum. Dátuverndarfólkið kann tó eisini loysa aðrar uppgávur fyri dátuábyrgdaran um hetta letur seg gera.

Dátuverndarfólkið er ikki partur av Dátueftirlitinum, og dátuverndarfólkið er heldur ikki eitt umboðsfólk hjá Dátueftirlitinum. Dátuverndarfólkið skal tó samstarva við Dátueftirlitið og virka sum kontaktpersónur ímillum dátuábyrgdaran og Dátueftirlitið. Dátuverndarfólkið kann á tann hátt hava eitt dagført yvirlit yvir avgerðir, vegleiðingar og annað sum kemur frá Dátueftirlitinum.

## 1.1 Sambandi millum dátuábyrgdaran og dátuverndarfólkið

Dátuábrygdarin hevur ábyrgdina av, at dátuverndarlógin verður hildin.

Tað er dátuábyrgdarin sum tilnevnir dátuverndarfólkið. Dátuverndarfólkið hevur til uppgávu at ráðgeva dátuábyrgdaranum um viðurskifti viðvíkjandi dátuvernd og skal verða við til at tryggja, at persónsupplýsingar hjá tí einstaka verða viðgjørdar á ein tryggan hátt.

Dátuábyrgdarin skal lurta eftir ráðgevingini frá dátuverndarfólkinum, men tað er dátuábyrgdarin sum til eina og hvørja tíð hevur ábyrgdina av, at løgtingslógin verður hildin. Dátuábyrgdarin hevur ábyrgdina av at áseta endamálið við viðgerðini og hvørji hjálparamboð verða nýtt. Tað er dátuábyrgdarin, sum kann ábyrgdast um dátuverndarlógin ikki verður hildin, sjálvt um eitt møguligt brot skyldast skeiva ráðgeving frá dátuverndarfólkinum.

# 2. Ábyrgdin hjá almennum myndugleikum at tilnevna eitt dátuverndarfólk

**Almennir myndugleikar skulu altíð hava eitt dátuverndarfólk.**

## 2.1 Nær skal ein almennur myndugleiki tilnevna dátuverndarfólk?

Ein almennur myndugleiki, sum viðgerð persónsupplýsingar, skal tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Ein almennur myndugleiki, sum viðgerð persónsupplýsingar fyri eina privata fyritøku, skal tilnevna eitt dátuverndarfólk. Ein almennur myndugleiki sum útveitir viðgerðina av persónsupplýsingum til eina privata fyritøku skal eisini tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Tá ein almennur myndugleiki letur eina privata fyritøku standa fyri viðgerðini av persónsupplýsingum, skal tann almenni myndugleikin tilnevna eitt dátuverndarfólk.

## 2.2 Nær er man ein almennur myndugleiki?

Almennir myndugleikar, sum eru fevndir av § 1, stk. 1, í fyrisitingarlógini[1], skulu tilnevna eitt dátuverndarfólk.

## 2.3 Felags dátuverndarfólk fyri almennar myndugleikar

Almennir myndugleikar kunnu tilnevna eitt felags dátuverndarfólk, um hetta samsvarar við bygnað og stødd á stovnunum.

Dátuverndarfólkið kann tá antin virka eftir einum setanarsáttmála fyri fleiri myndugleikar ella eftir tveimum hálvtíðarsettum setanarsáttmálum.

Um eitt dátuverndarfólk verður tilnevnt fyri fleiri stovnar, er tað eitt krav, at dátuverndarfólkið á ein nøktandi hátt kann røkja uppgávurnar sum dátuverndarfólk. Krøvini

[1] Løgtingslóg nr 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg

til starv, uppgávur, óheftni og atgongd skulu tí verða lokin, tá dátuverndarfólkið skal loysa uppgávur fyri fleiri stovnar samstundis.

Tað er ikki eitt krav, at dátuverndarfólkið er fysiskt til staðar á øllum stovnunum. Stovnarnir hava møguleika fyri at avtala, hvussu starvsfólkini koma í samband við dátuverndarfólkið. Hetta kann t.d. verð ígjøgnum teldupost, telefon, internet o.s.fr. Dátuverndarfólkið skal tó hava tíð at røkja uppgávurnar fyri allar stovnarnar á ein nøktandi hátt. Tískil er tað neyðugt at hyggja eftir mongdini av persónsupplýsingum sum stovnarnir viðgera. Er talan um eina stóra mongd av persónsupplýsingum, er vandi fyri, at dátuverndarfólkið ikki klárar at røkja uppgávuna á ein nøktandi hátt.

Kravið um óheftni kann hava við sær, at tað í ávísum førum er ivasamt, um fleiri stovnar kunnu hava eitt felags dátuverndarfólk. Kravið um óheftni skal verða uppfylt fyri allar stovnar, sum deilast um eitt dátuverndarfólk. Ein óheftur stovnur kann ikki hava felags dátuverndarfólk við ein annan stovn.

Tað er eitt krav, at tað bara er *ein* persónur sum er dátuverndarfólk. Fleiri persónar kunnu ikki vera dátuverndarfólk samstundis.

### 2.3.1 Kommunur

Kommunur hava eisini møguleika fyri at tilnevna eitt felags dátuverndarfólk

Dátuverndarfólkið kann ikki virka sum dátuverndarfólk fyri tvær kommunur eftir bara einari setanaravtalu. Tað er tó onki til hindurs fyri, at dátuverndarfólkið er sett parttíð í báðum kommununum.

Ein kommuna vil í flestu førum vera dátuábyrgdari fyri alla viðgerð av persónsupplýsingum, sum fer fram í kommununi. Kommunan kann tískil tilnevna eitt dátuverndarfólk fyri alla kommununa. Neyðugt er ikki, at kommunan tilnevnir eitt dátuverndarfólk fyri hvørja deild í kommununi.

### 2.3.2 Aðalráð og stovnar undir aðalráðnum

Aðalráð kunnu hava eitt felags dátuverndarfólk saman við stovnum undir aðalráðnum.

Viðmerkjast skal, at kravið um óheftni skal vera lokið fyri myndugleikar, sum deilast um dátuverndarfólk. Tað kunnu verða støður sum gera, at myndugleikar ikki kunnu deilast um eitt dátuverndarfólk. T.d. kann nevnast, at Dátueftirlitið og Løgmansskrivstovan ikki kunnu hava sama dátuverndarfólk. Støðan hjá Dátueftirlitinum, sum óheftur myndugleiki ger, at Dátueftirlitið ikki kann hava felags dátuverndarfólk saman við einum øðrum stovni.

Fyriskipanarligar broytingar, t.d. tá ein nýggj samgonga tekur við, kunnu hava við sær, at stovnar verða fluttir undir annað aðalráð. Í hesum føri kann tað verða mest praktiskt fyri stovnin at hava sítt egna dátuverndarfólk, í staðin fyri at hava felags dátuverndarfólk við aðalráðið.

## 2.4 Samanumtøka

- Allir almennir myndugleikar hava frá 1. januar 2021 skyldu at tilnevna eitt dátuverndarfólk
- Almennir myndugleikar hava møguleika fyri at deilast um eitt dátuverndarfólk
- Møguleikin fyri at tilnevna eitt felags dátuverndarfólk er við tí avmarking, at dátuverndarfólkið skal liva upp til krøvini í dátuverndarlógini

# 3. Ábyrgdin hjá privatum at tilnevna eitt dátuverndarfólk

**Í flestu førum skulu privat ikki tilnevna eitt dátuverndarfólk.**

## 3.1 Nær skulu privat tilnevna eitt dátuverndarfólk

Í flestu førum er ikki krav um at tilnevna dátuverndarfólk í privata geiranum.

Tó skulu fyritøkur tilnevna eitt dátuverndarfólk, tá kjarnuvirksemi hjá fyritøkuni er viðgerð av persónsupplýsingum, sum sambært sínum eyðkenni, vavi ella endamáli krevur umfatandi regluliga og skipaða yvirvøku av skrásettum persónum. Eisini tá kjarnuvirksemi hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgerðanum er umfatandi viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum skal dátuverndarfólk tilnevnast.

Ábyrgdin at tilnevna eitt dátuverndarfólk er galdandi bæði fyri dátuábyrgdaran og dátuviðgerðan.

Tær flestu fyritøkurnar í Føroyum, sum viðgera vanligar persónsupplýsingar, t.d. starvsfólkaupplýsingar, kundaupplýsingar o.s.fr., skulu ikki tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Ein fyritøka skal lúka tríggjar treytir fyri at verða fevnd av skylduni at tilnevna eitt dátuverndarfólk. Um t.d. bara ein ella tvær av treytunum eru loknar, er fyritøkan ikki fevnd av skylduni.

**Tríggjar treytir, sum allar skulu verða loknar**

- **Viðgerðin av persónupplýsingum skal vera kjarnuvirksemi hjá fyritøkuni**
- **Viðgerðin skal vera umfatandi**
- **Talan skal vera um yvirvøku av skrásettum, sum er reglulig og skipað ella viðgerð, sum fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar**

### 3.1.1 Treyt nr. 1: Kjarnuvirksemi

Fyrsta treytin, sum skal verða lokin er, at viðgerðin av persónsupplýsingum skal verða kjarnuvirksemi hjá fyritøkuni.

Hetta skal skiljast á tann hátt, at viðgerðin av persónsupplýsingum skal verða høvuðsvirksemi hjá fyritøkuni. Viðgerð av persónsupplýsingum skal ikki einans vera hjávirksemi.

Allar fyritøkur viðgera í ein ávísan mun persónsupplýsingar. Hóast ein fyritøka regluliga viðgerð persónupplýsingar, hevur hetta ikki altíð við sær, at kravið um kjarnuvirksemi er uppfylt. T.d. er tað í útgangsstøðinum ikki kjarnuvirksemi, tá ein fyritøka í sambandi við kundasamskifti, sølu ella starvsfólkamál viðgerð persónsupplýsingar. Viðgerð av persónsupplýsingum er í hesum føri neyðug, til tess at fyritøkan kann virka. Viðgerðin av persónsupplýsingum er tískil einans eitt hjávirksemi hjá fyritøkuni.

Um ein fyritøka einans viðgerð persónsupplýsingar sum hjávirksemi, er ikki krav um, at fyritøkan tilnevnir eitt dátuverndarfólk.

**Dømi um viðgerð, sum einans er hjávirksemi:**

- **Kundaupplýsingar**
- **Starvsfólkaupplýsingar**
- **Søla**
- **Kundaskrá**
- **Online bókingarskipan**
- **Bonuskort**
- **Viðgerð av kundaupplýsingum (grannskoðarar, advokatar, ingenørar o.s.v)**
- **KT-stuðul**

**Dømi um vinnuøki, sum ikki hava viðgerð av persónsuplýsingum sum kjarnuøki**

- **Hotel- og matstovuvinnan**
- **Smásøla**
- **Handverkaravinnan**
- **Tænastuvinnan**

Tá fyritøkur hava viðgerð av persónsupplýsingum sum ein grundleggjandi part av tænastuni sum fyritøkan bjóðar, er viðgerðin av persónsupplýsingum kjarnuvirksemi hjá fyritøkuni.

Sum dømi um fyritøkur, hvørs kjarnuvirksemi er viðgerð av persónsupplýsingum, kunnu nevnast fyritøkur sum bjóða goyming (hosting) av persónsupplýsingum, undir hesum útbjóðarar av marknaðarkanningum.

Tað kann eisini vera, at produktið er so óloysiligt samantvunnið við viðgerðina av persónsupplýsingum, at talan verður um ein kjarnuaktivitet. Tað er t.d. tryggingarfeløg, sum bjóða tryggingar grundaðar á persónsupplýsingar, sum eru savnaðar um verandi og komandi kundar.

Eisini útbjóðarar av tele- og interneti hava viðgerð av persónsupplýsingum sum kjarnuvirksemi.

**Dømi um viðgerð, sum er kjarnuvirksemi:**

- **Goyming (cloud hosting)**
- **Tryggingarfeløg**
- **Útbjóðarar av marknaðarkanningum**
- **Tele- og internet fyritøkur**
- **Útbjóðarar av appum sum eru baseraðar á viðgerð av persónupplýsingum**

### 3.1.2 Treyt nr. 2: Umfatandi viðgerð

Umframt at verða kjarnuvirksemi hjá fyritøkuni, skal viðgerðin av persónsupplýsingum vera umfatandi. Um ein viðgerð er umfatandi er ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum føri.

Umfatandi viðgerð kann fevna um viðgerð av eini ógvuliga stórari mongd av persónupplýsingum , sum viðkoma nógvum skrásettum persónum og sum sannlíkt hevur við sær stóran váða.

Fevnt av hugtakinum umfatandi er t.d. viðgerð av upplýsingum um kundar hjá einum tryggingarfelag. Í útgangsstøðinum kann eisini viðgerð av kundaupplýsingum hjá bankum vera umfatandi viðgerð. Tað sama er galdandi fyri útbjóðarar av tele- og interneti.

Viðgerð, sum ein lækni ella sakførari fremur um sjúklingar ella kundar er ikki at skilja sum umfatandi. Samanumtikið kann sigast, at tað í metingini av um ein viðgerð er umfatandi skal takast støði í m.a. mongdini av upplýsingum, mongdini av skrásettum persónum og tíðarskeiðið upplýsingarnar skulu viðgerðast. Eisini landafrøðiliga øki (alt Føroyar ella bara partar av Føroyum) viðgerðin fevnir um, kann innganga.

**Dømi um viðgerð av persónsupplýsingum sum er umfatandi:**

- **Ein stór mongd av persónsupplýsingum**
- **Upplýsingar um nógvar persónar**
- **Viðgerðin fer fram yvir longri tíð**
- **Viðgerð strekkir seg yvir eitt stórt landafrøðiligt øki**

**Dømi um feløg sum viðgera eina umfatandi mongd av persónsupplýsingum:**

- **Tryggingarfeløg**
- **Tele- og internetfyritøkur**

### 3.1.3 Treyt nr. 3: "Yvirvøka av skrásettum, sum er reglulig og skipað" *ella* "viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum"

Umframt felags treytirnar um, at viðgerðin skal fevna um kjarnuvirksemi og vera umfatandi, er eisini ein triðja treyt, sum skal vera lokin, áðrenn ein fyritøka hevur skyldu at tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Triðja treytin er, at talan *antin* skal vera um

- yvirvøku av skrásettum, sum er reglulig og skipað *ella*

- viðgerð, sum fevnir um viðkvæmar persónupplýsingar.

#### 3.1.3.1 Reglulig og skipaða yvirvøka av skrásettum

Yvirvøka av skrásettum, sum er reglulig og skipað, fevnir m.a. um sporing av atferð á internetinum, undir hesum sporing, sum hevur við sær, at tað er møguligt at profilera skrásett við tí endamáli at greina ella meta um atferð, hugburð ella sertokka. Reglulig og skipað yvirvøka kann eisini fara fram uttan fyri internetið. Fevnt er eisini rakstur av tele- og interneti og tænastum, sum eru knýttar at hesum, yvirvøka av fitness- og heilsuupplýsingum á berbarum eindum, profilering við tí endamáli at váðameta (t.d. í mun til lántøku ella trygging), trúskaparskipanir (loyalitetsprogram) o.s.fr.

#### 3.1.3.2 Viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum

Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um:

- Húðarlit
- Ættarslag ella etniskan uppruna
- Politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring
- Yrkisfelagsligt tilknýti
- Ílegudátur og biometrikar dátur við tí endamáli eintýtt at eyðmerkja ein persón
- Heilsuupplýsingar
- Upplýsingar um kynslig viðurskifti
- Upplýsingar um revsiverd viðurskifti
- Upplýsingar um munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti

### 3.1.4 Allar treytirnar eru loknar

Eru allar tríggjar treytirnar loknar, hevur ein privat fyritøka skyldu at tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Fyritøkur, sum hava viðgerð av persónsupplýsingum sum kjarnuvirksemi, sum hava eina umfatandi viðgerð av persónupplýsingum *og* hvørs viðgerð er reglulig og skipað yvirvøka av

skrásettum *ella* sum viðgera viðkvæmar persónupplýsingar, skulu tilnevna eitt dátuverndarfólk.

**Dømi um fyritøkur sum lúka allar treytirnar:**

- **Tryggingarfeløg**
- **Tele- og internetfeløg**
- **Marknaðarføringsfeløg sum gera marknaðarkanningar**

## 3.2 Sjálvboðin tilnevning av dátuverndarfólki

Fyritøkur kunnu eisini sjálvbodnar tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Krøvini til dátuverndarfólkið eru tey somu, tá privatar fyritøkur sjálvbodnar tilnevna eitt dátuverndarfólk.

Velur dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin at tilnevna eitt dátuverndarfólk, skulu reglurnar í dátuverndarlógini fylgjast. Orsøkin er, at um eitt starvsfólk fær tær uppgávur og tær skyldur, sum eitt dátuverndarfólk hevur, skal viðkomandi eisini hava ta somu verju. Arbeiðsgevarin kann tískil ikki fáa ágóðarnar av at hava eitt dátuverndarfólk uttan eisini at vera fevndur av skyldunum.

Um ein fyritøka harafturímóti velur at tilnevna ein compliance-ráðgeva, er fyritøkan ikki bundin til at fylgja krøvunum í dátuverndarlógini. Tað er einans tá fyritøkan beinleiðis tilnevnir eitt dátuverndarfólk, at krøvini í løgtingslógini skulu fylgjast.

## 3.3 Felags dátuverndarfólk

Eitt samtak hevur møguleika fyri at tilnevna eitt felags dátuverndarfólk fyri alt samtakið. Tað er tó eitt krav, at allar deildir í samtakinum hava eins lætt við at koma í samband við dátuverndarfólkið. Tað er eisini eitt krav, at tað er sett nokk av tíð og orku av, so at dátuverndarfólkið kann røkja uppgávur á nøktandi hátt.

Aðrir dátuábyrgdarar og dátuviðgerðar enn samtøk, hava eisini møguleika fyri at tilnevna eitt felags dátuverndarfólk. Ymisk samtøk ella samstørv kunnu tískil hava felags dátuverndarfólk. Í hesum sambandi kann t.d. ein ráðgevingarfyritøka virka sum dátuverndarfólk fyri fleiri dátuábyrgdarar.

Um ein ráðgevingarfyritøka skal verða dátuverndarfólk fyri fleiri fyritøkur samstundis, er tað eitt krav, at dátuverndarfólkið á ein nøktandi hátt kann loysa allar uppgávurnar sambært dátuverndarlógini, og at tað ikki hevur við sær áhugamálsstríð.

## 3.4 Samanumtøka

- Tað skal nógv til áðrenn ein privat fyritøka er bundin til at tilnevna eitt dátuverndarfólk.

- Trý krøv skulu vera lokin áðrenn ein fyritøka er bundin til at tilnevna eitt dátuverndarfólk. Øll krøvini skulu vera lokin.

- Allar fyritøkur eiga at gera eina ítøkiliga meting av, um krøvini er uppfylt. Eru øll trý krøvini ikki lokin, er fyritøkan ikki bundin til at tilnevna eitt dátuverndarfólk.

# 4. Dátuverndarfólkið

## 4.1 Krøv til fakligar førleikar

Dátuverndarfólkið skal tilnevnast grundað á sín fakliga førleika. Hetta fevnir m.a. um serkunnleika til dátuverndarrætt og førleikan at útinna tær uppgávur, sum dátuverndarfólkinum verða álagdar í løgtingslógini.

Í hesum liggur eitt krav um, at tann persónurin sum verður tilnevndur, hevur útbúgving og royndir, sum gera, at viðkomandi er førur fyri at meta um, um viðgerð, sum fer fram og er ætlað, er í samsvari við dátuverndarlógina. Eisini skal persónurin vera førur fyri at røkja uppgávurnar sum eru lagdar til dátuverndarfólkið.

Fyri at lúka hesar treytir verður í útgangsstøðinum lagt upp til, at persónurin hevur løgfrøðiligar førleikar innan dátuverndarrætt og hevur royndir á hesum økinum. Á hvørjum støði hesir førleikar ella royndir skulu vera, velst um viðgerðina av persónupplýsingum, undir hesum mongd, viðkvæmi og torgreidni.

Tað er tó ikki eitt krav, at dátuverndarfólkið er løgfrøðingur (cand.jur) ella hevur eina serliga útbúgving. Hetta verður upp til dátuábyrgdaran ella dátuviðgeran at meta um.

Í ávísum førum kann tað eisini vera skilagott, um dátuverndarfólkið hevur eina tøkniliga útbúgving ella ávísar tøkniligar førleikar.

Tað er ikki ein treyt at nýtt fólk skal setast. Tað kann vera nøktandi, at starvið sum dátuverndarfólk verður røkt av starvsfólki, sum longu er sett. Starvsfólkið kann tá røkja uppgávuna sum dátuverndarfólk við síðuna av øðrum uppgávum.

Møguleiki er eisini fyri, at uppgávan verður útveitt til t.d. ein konsulent eftir einum tænastuveitingarsáttmála.

## 4.2 Hvør kann verða dátuverndarfólk

Í útgangsstøðinum kunnu øll verða dátuverndarfólk.

Hesi kunnu røkja starvið sum dátuverndarfólk:

- eitt innanhýsis starvsfólk
- eitt uttanhýsis dátuverndarfólk
- eitt felags dátuverndarfólk

### 4.2.1 Innanhýsis starvsfólk

Ein fyritøka ella myndugleiki kann velja eitt starvsfólk sum longu er í starvi at vera dátuverndarfólk. Hetta kann t.d. vera ein persónur, sum hevur royndir við at arbeiða við persónsupplýsingum.

Tað er ikki eitt krav, at starvsfólkið skal starvast sum dátuverndarfólk fulla tíð. Starvsfólkið kann tískil røkja uppgávurnar sum dátuverndarfólk sum ein part av sínum vanliga starvi. T.d. kann eitt starvsfólk arbeiða 10 tímar um vikuna sum dátuverndarfólk, ímeðan restin av tíðini verður brúkt til at loysa aðrar uppgávur.

Altavgerandi er, at dátuverndarfólkið hevur møguleika fyri at røkja starvið sum dátuverndarfólk á ein nøktandi hátt.

Hvussu nógva tíð dátuverndarfólkið hevur brúk fyri til tess at kunna røkja starvið, er ein ítøkilig meting av tørvinum hjá tí einkultu fyritøkuni ella stovninum.

#### 4.2.1.1 Innanhýsis starvsfólk sum ikki kunnu verða dátuverndarfólk

Dátuverndarfólkið skal vera óheft og hava møguleika fyri at geva óhefta ráðgeving til fyritøkuna.

Hetta hevur við sær, at dátuverndarfólkið ikki kann vera tann persónurin, sum hevur evstu ábyrgdina av, at viðgerðin fer lógliga fram. Leiðarin fyri KT-deildini ella HR-deildini í fyritøkuni kunnu tískil ikki vera dátuverndarfólk.

### *Dømi – Fyritøkur við fáum starvsfólkum*

Fyritøkur við fáum starvsfólkum, t.d. einstaklingavirkir, kunnu hava trupulleikar at halda kravið um, at dátuverndarfólkið ikki skal vera leiðari fyri KT- ella HR-deildina í fyritøkuni. Fyritøkan hevur í hesum føri møguleika fyri at brúka ein uttanhýsis konsulent ella at deilast um dátuverndarfólk við eina aðra fyritøku.

### 4.2.2 Uttanhýsis dátuverndarfólk

Fyritøkur og stovnar kunnu eisini tilnevna eitt uttanhýsis dátuverndarfólk. Hetta kann vera ein ráðgevi t.d. advokatur ella grannskoðari ella onkur annar uttanhýsis skikkaður partur. Viðkomandi uttanhýsis partur skal sjálvsagt lúka møgulig krøv, sum eru innanfyri viðkomandi vinnugrein.

### 4.2.3 Felags dátuverndarfólk

Bæði privatar fyritøkur og almennir myndugleikar hava møguleika fyri at tilnevna eitt felags dátuverndarfólk. Bygnaðurin og støddin á fyritøkunum ella stovnunum skulu tó passa saman.

## 4.3 Uppgávurnar hjá dátuverndarfólkinum

Uppgávan hjá dátuverndarfólkinum er at ráðgeva dátuábyrgdaranum og hjálpa fyritøkuni at halda dátuverndarlógina.

Dátuverndarfólkið skal í minsta lagi kunna og ráðgeva dátuábyrgdaran, dátuviðgeran og starvsfólk, sum viðgera persónupplýsingar, um teirra skyldur sambært dátuverndarlóginigini, halda eyga við, at dátuverndarlógin og aðrar reglur o.a. um dátuvernd verða hildnar, ráðgeva, tá ið biðið verður um tað, um avleiðingargreiningina um dátuvernd og at halda eyga við, at hon verður gjørd í samsvari við reglurnar, samstarva við Dátueftirlitið og virka sum samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum í spurningum um viðgerð av persónupplýsingum.

Dátuverndarfólkið skal arbeiða váðagrundað og raðfesta uppgávurnar og hava serligt fokus á økir, har størsti vandi er fyri broti á dátuverndarlógina. Økini, har sum vandin fyri broti ikki er líka stórur, skulu tó ikki gloymast.

Tað er onki sum forðar dátuverndarfólkinum í at loysa fleiri uppgávur enn tær kravdu.

Uppgávurnar hjá dátuverndarfólkinum kunnu vera nærri lýstar í setanarsáttmálanum.

Sjálvt um dátuverndarfólkið skal halda eyga við, at dátuverndarlógin verður hildin, hevur hetta ikki við sær, at dátuverndarfólkið hevur ábyrgdina av, at so er. Ábyrgdin liggur framhaldandi hjá dátuábyrgdaranum. Varnast dátuverndarfólkið, at dátuverndarlógin ikki verður hildin, skal viðkomandi gera vart við hetta – eftir umstøðunum til ovasta leiðslustig

Sambært § 58 í dátuverndarlógini eru nakrar uppgávur, sum dátuverndarfólki í minsta lagi skal røkja. Hesar eru:

### 4.3.1 Kunna og ráðgeva dátuábyrgdara, dátuviðgera og starvsfólkunum um dátuvernd

- Ítøkilig ráðgeving um vernd av persónsupplýsingum í fyritøkuni og umrøða og taka avgerð um hvussu fyritøkan tryggjar compliance, t.d. í sambandi við:
  - Innkeyp av KT-útgerð
  - Krøv til leverandørar
  - Gera uppskot til dátuverndarpolitikk hjá fyritøkuni
  - Seta í verk viðgerð av persónsupplýsingum
  - Umrøða, um ein ávís viðgerð av persónsupplýsingum er í samsvari við dátuverndarlógina
- Vera tøkur til at ráðgeva starvsfólkum og leiðsluni í fyritøkuni um dátuvernd
- Ráðgeva í sambandi við ger av avleiðingargreining hjá fyritøkuni
- Taka ímóti boðum um brot á dátuverndarlógina og ráðgeva felagnum í hesum sambandi.

### 4.3.2 Halda eyga við at dátuverndarlógin og aðrar reglur um dátuvernd verða hildnar

- Dátuverndarfólkið skal halda eyga við
  - Dátuverndarpolitikkinum
  - Um starvsfólk verða útbúgvin innan dátuvernd
  - Um átøk verða hildin um dátuvernd

### 4.3.3 Ráðgeva um avleiðingargreiningina um dátuvernd, og halda eyga við, at hon verður gjørd í samsvari við reglurnar

Dátuverndarfólkið skal – um dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin biður um tað – ráðgeva um avleiðingagreiningina, sum sambært §§ 49 og 59 í dátuverndarlógini skal gerast í serligum førum, tá ein viðgerð av persónsupplýsingum sannlíkt hevur við sær stóran váða fyri tann skrásetta.

### 4.3.4 Samstarva við Dátueftirlitið og virka sum samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum í spurningum um viðgerð av persónupplýsingum

Dátuverndarfólkið hevur skyldu at samstarva við Dátueftirlitið. Hetta kann t.d. vera um Dátueftirlitið vendir sær til dátuverndarfólki at fáa upplýsingar um eina viðgerð. Dátuverndarfólki er samskiftisstað hjá Dátueftirlitinum, sum merkir, at Dátueftirlitið fyrst og fremst vendir sær til dátuverndarfólkið um spurningar stinga seg upp.

## 4.4 Krav um rættstundis og nøktandi hoyring av dátuverndarfólkinum

Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu tryggja, at dátuverndarfólkið rættstundis verður tikin við upp á ráð í øllum spurningum um vernd av persónupplýsingum. Hetta kann m.a. tryggjast við, at dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin hava fastar innanhýsis mannagongdir fyri, at dátuverndarfólkið verður tikið við uppá ráð á ein nøktandi hátt.

Dátuverndarfólkið skal hava møguleika at greiða frá sínum sjónarmiði á ovasta leiðslustigi.

### 4.4.1 Nær skal dátuverndarfólkið takast við uppá ráð?

Dátuverndarfólkið skal verða tikin við upp á ráð í øllum spurningum, sum snúgva seg um at halda dátuverndarlógina og aðrar reglur um vernd av persónupplýsingum, undir hesum innanhýsis politikkir.

*Dømi um spurningar, sum dátuverndarfólkið skal takast við uppá ráð um*

- Metingar og avgerðir um hvussu fyritøkan ella myndugleikin tryggjar, at dátuverndarlógin verður hildin
- Metingar í sambandi við dátutrygd, herundir dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og dátuvernd ígjøgnum standardstillingar
- Í sambandi við ger av avleiðingargreining

Um dátuverndarfólkið verður valt áðrenn 1. januar 2021, kann dátuverndarfólkið luttaka í arbeiðinum at tryggja, at fyritøkan ella myndugleikin er klárur, tá løgtingslógin kemur í gildi.

**Dømi um spurningar, tá tað ikki er neyðugt at taka dátuverndarfólkið við uppá ráð:**

- **Ítøkiligar metingar í sambandi við rættindini hjá skrásetta, t.d. umbøn um innlit og rætturin til striking**
- **Luttøka í smærri praktiskum ella vanligum uppgávum viðvíkjandi rakstri og uppsetan av KT-skipanum.**
- **Tá dátuviðgeraravtalur verða gjørdar**

### 4.4.2 Hvussu skal dátuverndarfólkið takast við uppá ráð?

Fyritøkan ella myndugleikin er bundin at kunna dátuverndarfólkið nøktandi og rættstundis um allar spurningar, sum viðvíkja vernd av persónsupplýsingum.

At dátuverndarfólkið skal verða tikið við upp á ráð rættstundis hevur í útgangsstøðinum við sær, at dátuverndarfólkið skal hava stundir at seta seg inn í málið og koma við viðmerkingum o.s.fr., áðrenn ein viðgerð verður sett í gongd.

### 4.4.3 Nær er dátuverndarfólkið tikið við uppá ráð rættstundis?

Dátuverndarfólkið skal verða tikið við uppá á ráð í so góðari tíð sum møguligt, áðrenn ein viðgerð verður sett í gongd.

Dátuverndarfólkið skal hava tíð til at koma við einari ítøkiligar meting, um tann ætlaða viðgerðin av persónsupplýsingum er í samsvari við dátuverndarlógina. Dátuverndarfólkið skal eisini hava møguleika fyri at koma við ítøkiligum viðmerkingum til ætlaðu viðgerðina.

**Dømi um stundisliga hoyring av dátuverndarfólkinum**

- **áðrenn avgerð verður tikin um neyðug tiltøk í KT-skipanum fyri at halda krøvini um dátuvernd ígjøgnum sniðgeving og dátuvernd ígjøgnum standardstillingar**
- **áðrenn vegleiðingar og mannagongdir fyri hvussu dátuverndarlógin skal haldast verða gjørdar**
- **áðrenn almannakunngering av útboðstilfari í einari útbjóðingarrundu ella líknandi**

**Dømi um føri, tá dátuverndarfólki ikki verður hoyrt stundisliga:**

- **eftir at ein nýggj KT-skipan er gjørd ella keypt**
- **eftir at avleiðingargreiningin er gjørd**
- **eftir at størri broytingar eru gjørdar í felagnum sum viðvíkja dátuvernd, t.d. handfaring av innlitsumbønum frá skrásettum**

### 4.4.4 Viðgerðir sum eru farnar í gongd, áðrenn dátuverndarfólkið er tilnevnt

Tá ein fyritøka ella myndugleiki tilnevnir eitt dátuverndarfólk, vilja tað sjálvsagt vera viðgerðir av persónsupplýsingum, sum longu eru farnar í gongd.

Í byrjanini eigur dátuverndarfólkið at hava fokus á, at viðgerðin av persónsupplýsingum hjá fyritøkuni ella myndugleikanum í framtíðini er í samsvari við lógina. Harafturat kann

dátuverndarfólkið verða við í metingini av, um viðgerðin av persónsupplýsingum sum longu er í gongd, er í samsvari við dátuverndarlógina.

### 4.4.5 Nær er hoyringin nøktandi?

Dátuverndarfólkið skal á ein nøktandi hátt takast við uppá ráð viðvíkjandi metingum og avgerðum hjá fyritøkuni ella myndugleikanum, sum viðvíkja dátuverndini.

Dátuábyrgdarin ella dátuviðgerin skal taka hædd fyri viðmerkingum og ráðgeving sum dátuverndarfólkið kemur við. Verða tilmæli frá dátuverndarfólkinum ikki fylgd, verður mælt til, at niðurstøðan verður skjalfest.

### 4.4.6 Tíð og orka

Fyri at dátuverndarfólkið kann røkja uppgávurnar á ein nøktandi hátt, er tað neyðugt, at dátuverndarfólkið hevur tíð og orku at gera sítt arbeiði.

Dátuverndarfólkið skal hava stundir at taka sær av uppgávunum, og nokk av orku, undir hesum amboðum og peningi, skal verða sett av til at røkja hesar uppgávur. Hvussu nógv tíð og orka  skal setast av til uppgávuna er ein ítøkilig meting, sum m.a. tekur støði í støddini av fyritøkuni ella myndugleikanum, hvørjar viðgerðir fara fram, hvussu torgreiddar tær eru, og hvørjir váðar standast av viðgerðini.

Eisini skulu dátuábyrgdarin og dátuviðgerin stuðla undir, at dátuverndarfólkið varðveitir sín sakkunnleika. Hetta kann t.d. vera við hóskandi møguleikum fyri eftirútbúgving.

**Metingin um tørvin á orku er ítøkilig á hvørjum arbeiðsplássi. Dømi um orku kunnu vera:**

- **Hjálparamboð og arbeiðsamboð**
- **Fíggjarlig játtan**
- **Starvsfólkaorka og líknandi**

### 4.4.7 Atgongd

Dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu veita dátuverndarfólkinum atgongd til persónupplýsingar og viðgerðir, av tí at hetta er neyðugt fyri, at dátuverndarfólkið kann røkja sínar uppgávur til fulnar.

Dátuverndarfólkið skal hava eina víða atgongd, sum kann tillagast eftir tørvi.

### 4.4.8 Óheftni

Tað er eitt grundleggjandi krav, at ongin skal kunna geva dátuverndarfólkinum kravboð, um hvussu viðkomandi skal røkja sítt arbeiði.

Hetta er galdandi fyri dátuverndarfólkið:

- Dátuverndarfólkið skal ikki taka ímóti boðum um hvussu viðkomandi skal fremja sítt arbeiði (t.d. um eina ítøkiliga meting ella tulking av dátuverndarlógini)
- Kann ikki sigast úr starvi ella revsast fyri at røkja sínar uppgávur
- Skal geva frágreiðing beinleiðis til leiðsluna

Tað er skyldan hjá dátuábyrgdaranum og dátuviðgeranum at tryggja, at dátuverndarfólkið ikki fær kravboð um, hvussu starvið skal røkjast.

Møguleikin hjá dátuverndarfólkinum at geva frágreiðing til leiðsluna er samantvunnði við kravið um óheftni. Sum liður í at tryggja óheftni hjá dátuverndarfólkinum er tað tískil ásett í dátuverndarlógini, at dátuverndarfólkið gevur frágreiðing beinleiðis til ovasta leiðslustig hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum. Dátuverndarfólkið kann geva frágreiðing regluliga ella eftir tørvi, so sum fyritøkan ella myndugleikin velja at innrætta seg.

Hvat ovasta leiðslustig er, veldst um bygnaðin hjá dátuábyrgdaranum ella dátuviðgeranum.

Í privatum fyritøkum, sum hava eina nevnd og eina stjórn, er tað stjórnin, sum tekur sær av dagliga rakstrinum, sum er at meta sum ovasta leiðslustig í mun til hesa áseting, sjálvt um tað bygnaðarliga er nevndin, sum hevur evsta valdið í fyritøkuni.

Fyri almennar myndugleikar er ovasta leiðslustig at skilja sum ovasta fyrisitingarliga leiðsla.

Í kommunum gevur dátuverndarfólkið frágreiðing beinleiðis til kommunustýrið uttan at hetta krevur viðgerð í serligari nevnd áðrenn.

## 4.5 Vernd av dátuverndarfólkinum

Í dátuverndarlógini er tað eitt forboð ímóti at siga dátuverndarfólkið úr starvi fyri at gera sítt arbeiði sum dátuverndarfólk.

Talan er ikki um eina treytaleysa vernd ímóti uppsøgn. Dátuverndarfólk kunnu sostatt – sum onnur starvsfólk – sigast úr starvi um tey t.d. ikki røkja sínar arbeiðsuppgávur ella ikki halda starvssáttmálan.

## 4.6 Samandráttur

- Dátuverndarfólkið skal veljast eftir førleika. Dátuverndarfólkið kann vera eitt starvsfólk sum longu er í starvi, eitt felags dátuverndarfólk fyri alt samtakið ella eitt úttanhýsis dátuverndarfólk

- Dátuverndarfólkið hevur eina røð av uppgávum, sum viðkomandi í minsta lagi skal røkja. Tað verður viðmælt, at tað verður avklárað hvørjar uppgávur dátuverndarfólkið skal røkja

- Eitt felag skal stundisliga og nøktandi hoyra dátuverndarfólkið í øllum spurningum, sum viðvíkja vernd av persónsupplýsingum

- Dátuverndarfólkið er vart ímóti ósakligar uppsøgn og kann ikki sigast úr starvi ella revsast fyri at røkja uppgávurnar sum dátuverndarfólk.

**Vegleiðing**
© 2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið